TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Pedagogar og hjálparfólk til Dagstovnin á Løgmannabreyt

Tórshavnar kommuna søkir eftir 3 pedagogum 30-40 tímar um vikuna og 4 hjálparfólkum 40 tímar um vikuna til nýggja Dagstovnin á Løgmannabreyt.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sofíu Nattestad, leiðara, tlf. 225782 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. mars 2003. Viðmerk á umsóknina "Pedagogur/hjálparfólk á Løgmannabreyt".

**Dagstovnurin á Løgmannabreyt**

Stovnurin liggur væl fyri í einum øki í støðugum vøkstri við nógvum barnafamiljum, barnavinarligum og náttúruríkum umhvørvi.

Stovnurin verður skipaður við 2 vøggustovum við 12 børnum í hvørjari og 2 barnagarðsstovum við 18 børnum í hvørjari.

Tilsamans 60 børn og 12 starvsfólk verða á stovninum.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Pedagogur til útistovuna á Hvítanesi

Tórshavnar kommuna søkir eftir pedagogi 35 tímar um vikuna í útistovu við 5-7 ára gomlum børnum. Starvið verður sett 1. apríl 2003.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Poulu Eidesgaard, leiðara, tlf. 317701 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Býlingahúsinum inni á Gøtu, Ovaragøta 30b, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi mánadagin 17. mars 2003.

**Útistovan á Hvítanesi**

Útistovan á Hvítanesi er knýtt at býlingshúsinum inni á Gøtu. Í útistovuni ganga 16 børn. Vit halda til í sera hugnaligum umhvørvi í gamla skúla á Hvítanesi.

Á stovninum eru 3 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum, og tú ført høvi at gera tína ávirkan galdandi.

www.torshavn.fo




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 448, Sp/f Verkfrøðingastovan, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 04.11.2002.
**Nýtt hjánavn:** Sp/f V. F. S. (Sp/f Verkfrøðingastovan)

*Skráseting Føroya tann 3. mars 2003*

*Kristin Balle*







**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim**
800 Tvøroyri

# Frítíðaravloysarar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum í tíðarskeiðnum 1. juni til 30. september 2003 fyri:

- Sjúkrarøktarfrøðingum
- Sjúkrahjálparum/heilsuatstøðingum

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála við ávikavist Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar/Almanna- & heilsurøktarfelagið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til fyristøðukvinnuna Sunnevu Petersen tlf. 371666 lokal 147.

Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim**
Postrúm 51
800 Tvøroyri

innan 25. mars 2003.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
800 Tvøroyri

# Sjúkrarøktar-frøðingar

Søkt verður eftir avloysara til skurð/røntgen deildina í tíðarskeiðinum frá 1. mei til 1. september 2003.

Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til fyristøðukvinnuna tlf. 371133 lokal 128.

Skrivlig umsókn við prógvum og autorisatión skal sendast til:

**Umsjónarmaðurin**
**Suðuroyar Sjúkrahús**
800 Tvøroyri

Umsóknarfreist 25. mars 2003.

# Aðalfundur

Aðalfundur í Hondbóltssambandi Føroya verður leygardagin 5. apríl klokkan 10.

**Starvsnevndin**



# 3 Cubabátar til sølu

Við hesum verða

## Munkur, Skúgvur og Grælingur

lýstir til sølu



Bátarnir hava ikki fiskiloyvi í føroyskum sjógvi.

Nærri fæst at vita við at venda sær til:
**P/F Beta • 600 Saltangará**
**Tel. 44 99 66 • ella 21 99 66**

**Prísur**

# Travel Card




Prísur á Travel Card hjá Strandfaraskipum Landsins er frá 1. mars 2003 broyttur til

| | |
|---|---|
| 4 dagar kr. 600 | 7 dagar kr. 900 |

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ

TK Stovan

# Kunningarfundur um broytingarfúsa leiðslu

**Dagur: 6. mars 2003**
**Hósdag kl. 14.00-17.00 á Hotel Føroyum**

**Skrá**
**14.00 Kunning um broytingarfúsa leiðslu**
- Avbjóðingar í broytingum
- Mynstur í broytingum
- Brennandi pallur
- Hugsjónin fyri broytingina

**15.00 Kaffisteðgur**
**15.30 Broytingarfús leiðsla – framhald**
- Meginreglan í dupultum bókhaldshátti
- Persónlig atburðarmynstur
- Kjak og prát

**17.00 Liðugt**

## Broytingarfús leiðsla

**Øll vilja hava broyting, men eingin vil broyta seg...**
Allar broytingar byrja við, at einstaklingar og virkir eru til reiðar at fara ígjøgnum broytingina og tískil eisini eru til reiðar at bera seg øðrvísið at enn áður.

**Kunningarfundurin snýr seg um:**
- Hví er tað so torført at fremja broytingar?
- Hvussu verður broytingarfús leiðsla ítøkilig og skiljandi?
- Hvørjar vanligar orsøkir eru til mótstøðu ímóti broytingum?
- Hvussu lofta vit og beina burtur mótstøðu ímóti broytingum?
- Hvussu ber til at skilja og arbeiða við persónligum atburðarmynstrum í eini broytingartilgongd?
- Hvørjar hættur og ítøkilig amboð finnast, ið kunnu nýtast í broytingartilgongdini?

Skeiðleiðari er Eggert Cederholm frá Implement.

Við at luttaka á fundinum kannst tú læra meira um, hvussu tú lættari kann fremja broytingar í verki.

**Kostnaður:** kr. 600 u/mvg

**Tilmelding:** TK Stovan, faks nr. **31 93 63**, tel. **31 73 66** ella **teldupostur tk@tk.fo** - Tilmeldingarfreist í seinasta lagið mikudagin **5. mars 2003 kl. 16.00.**

Virkisnavn: ______ Tal á luttakarum: ______

Navn/nøvn: ______

Tel.: ______ Faks: ______

**TK Stovan**
Niels Finsens gøta 37, FO-100 Tórshavn
**Tel** +298 317366, **Faks** +298 319363
tk@tk.fo
www.tk.fo

**VILJI VITAN VØKSTUR**

TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí umfevnandi danska TIC-kunningarsamstarvinum.

SANSIR 355 355



# Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

Ársaðalfundur Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag verður í Eiriksgarði í Dali fríggjakvøldið 21. mars kl. 19.30. Aftaná verður hugnaløta við onkrum til matna og við luttøku av tingfólki floksins.

Skrá sambært løgum felagsins.

**Nevndin**







# Lastbilar til sølu

**Scania 143 H**, 6x2 árg. '93 við fylgjandi útgerð:
- 3-vegis wirehejs við útgerð til luftbaklúku
- Palfinger, PK 16000 krani, árg. 2000.

**Scania 113 M**, 6x2, árg. '88 við 3 vegis wirehejs og dumparalast við luftbaklúku.

Bilarnir verða seldir, um nøktandi boð fæst.

Nærri fæst at vita um bilarnar á

**tlf. 350700 ella við at ringja til Jón á tlf. 210683**

ARTICON